## Hvussu kann eg fáa samdøgursrehabilitering?

Til ber at søkja um samdøgursrehabilitering við at útfylla umsóknarblaðið, sum finst á heimasíðuni **www.nbh.fo.**

Gjaldið er kr.162,- um samdøgrið, og rokning verður send, tá ið tíðarskeiðið er lokið.

Eftir at umsóknin er móttikin, seta vit okkum í samband við teg.

Ert tú í iva um okkurt ella hevur spurningar ber til at venda sær til rehabiliteringstoymið á tlf. 793415/ 793460, gerandisdagar millum kl. 8-15.

NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA

**Norðoya Bú- og Heimatænasta**
Nólsoyar Pálsgøta 32
Postsmoga 2
710 Klaksvík

NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA

# Samdøgursrehabilitering




## Sambýlið á Heygnum

## Ven og Virka

## Hvat er Samdøgursrehabilitering?

Samdøgursrehabilitering er eitt endurmenningartilboð til heimabúgvandi fólkapensjonistar í Norðoyggjum, sum hava mist virkisførleikar, og hava ynski um at endurvinna førleikan fyri aftur at megna gerandisdagin.

Eitt tvørfakligt toymið við ergoterapeutum, fysio-terapeutum, sjúkrarøktarfrøðingi og røktarstarvsfólkum stuðla tær at røkka tínum málum.

Saman við tær og møguligum avvarðandi seta vit, við støði í tínum ynskjum mál og leggja eina ætlan, sum ítøkiliga lýsir,  hvussu og hvussu leingi farast skal fram fyri at røkka tínum málum.




## Sambýlið á Heygnum og Ven og Virka

Tú kemur at gista á **Sambýlinum á Heygnum**, har fimm pláss eru sett av til samdøgursrehabilitering.

**Ven og Virka** er venjingarhølið hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu við nútímans útgerð, har tú fert at venja hvønn dag saman við fysioterapeutum og ergoterapeutum fyri at betra um t.d. styrki, úthaldni, javnvág og smidleika.



Venjingarnar kunnu eisini snúgva seg um at betra um gerandisførleikar t.d. flytføri, persónligt reinføri, í- og úrlæting, áhugamál og hvørji hjálpartól tú hevur tørv á.